Nýggj heimasíðuskipan

# SANSIR • net

advanced CMS made easy



## Snarknøttur

Við Sansir.net kanst tú gera broytingar beinleiðis frá heimasíðuni. Vilt tú broyta eina ávísa síðu, kanst tú við snarknøttinum fara beinleiðis inn frá heimasíðuni og gera broytingina á staðnum. Tá broytingin er gjørd, trýstur tú á goym og kemur út aftur á heimasíðuna. Skjótari og lættari kann tað ikki gerast.




## Preview

Tá ið arbeitt verður við einari nýggjari síðu, er tað umráðandi, at til ber at síggja, hvussu síðan fer at síggja út, áðrenn hon verður løgd út. Við Sansir.net er hetta altíð ein møguleiki. Tú kanst arbeiða við einari síðu, síggja eitt dømi og arbeiða víðari við síðuni, um úrslitið ikki er, sum tú ætlaði.



## Myndaviðgerð

Við Sansir.net er tað lætt og skjótt at viðgera myndir. Tú hevur møguleikar at minka eina mynd, klippa myndina og/ella venda myndini allar vegir. Eisini ber til at broyta litirnar og gera myndina ljósari ella myrkari. Tá ið myndin er liðugt viðgjørd, setur tú hana á síðuna júst har, sum tú vilt hava hana. Skjótari og stuttligari kann tað ikki gerast.




## Brúkarastýring

Við framkomnu brúkarastýringini ber til at geva brúkarum júst tey rættindi, sum teir skulu hava. Á tann hátt kunnu ávísir brúkarar hava víðfevnd rættindi, meðan aðrir kunnu hava avmarkað rættindi til ávísar síður. Eisini ber til at geva vitjandi rættindi til ekstranet, meðan onnur fáa rættindi til intranetið hjá fyritøkuni, stovninum ella felagnum.

Sansir.net er ein tann mest brúkaravinarliga heimasíðuskipanin í heiminum. Sera framkomin og løtt at brúka.

SANSIR

Sansir • Dvørgastígur 7 • FO-100 Tórshavn • www.sansir.net • www.sansir.fo • Tel 355 355